

# Bora við fullari ferð

**Á boripallinum Stenadon verður borað við fullari ferð, og bæði Jarðfeingi og Statoil siga, at higartil gongur alt sum ætla**

OLJUBORING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Á veg til Føroya mikumorgunin sigldi Nørrøna framvið oljuboripallinum Stenadon, sum fyri einum góðum mánaði síðani var at síggja á Nólsoyarfirði og í Runavík.

Á myndini síggja vit boripallin, har dagliga eini 100 fólk starvast. Skipið á myndini er eitt av teimum sokallaðu veitingarskipunum, sum er knýtt at boripallinum. Tað liggur altíð eitt skip hjá boripallinum, og síðani er eitt, sum siglir í millum oljuhavnina í Runavík og boripallin.

Avtalað er, at Oljumálaráðið skal koma við einum tíðindaskrivi, tá okkurt er frætta frá boringini, og av tí sama vilja tey ikki út við nógvum á Statoil ella hjá Jarðfeingi.

Tað einasta, sum fæst burtur úr teimum er, at tað gongur sum ætlað, og tað má við øðrum orðum merkja, at borað verður við fullari ferð.

# Føroya Banki bjóðar kvinnum á íløgufund

**Mikukvøldið 23. august kl. 19.30 skipar Føroya Banki fyri íløgukvøldi í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Kvøldið verður ein forvitnsiligur blandingur av serkønum innleggum um kvinnur og pengar og skemti, hugna og ábiti**

ÍLØGUR
*tíðindaskriv*

Úr Føroya Banka fara Rúna Hentze, íløguráðgevi, og Kristina Háfoss, verkætlanarleiðari, at leggja fram. Ein kend kvinna úr føroyskum samfelagslívi fer eisini at siga sína hugsan um kvinnur og pengar.

Endamálið við íløgukvøldinum er fyrst og fremst at upplýsa um, hvørjar fíggjarligar møguleikar kvinnur hava, og eggja kvinnum til at taka størri ábyrgd av sínum fíggjarviðurskiftum.

Kanningar hava víst, at kvinnur duga serliga væl at fáa avkast av íløgum, tí tær hava eina so veruleikakenda fatan at váða og møguligum vinningi. Meira verður at hoyra um m.a. hetta á fundinum.

Millum framløgurnar verður góður tónleikur at hoyra, og skemtilig brot úr sjónleiki verða framførd. Eftir framløgurnar bjóðar Føroya Banki ábit, sum bara mannligir tænarar servera.

Vilt tú vita meira um tínar fíggjarligu møguleikar, tekna teg so til forkunnuga íløgukvøldið á www.foroyabanki.fo. Tú mást skunda tær, tí plássini eru avmarkað.

## STUTT SAGT

### Anfinn Kallsberg sett samskiftisráðgeva



*Anfinn Kallsberg og nýggi samskiftisráðgevin Jóhann Lützen*

Frameftir verður kunningin hjá føroyska fólkatingsliminum Anfinni Kallsberg óivað munandi betri, tí í tíðindaskrivi kunngerð Kallsberg, at hann hevur sett Jóhann Lützen sum samskiftisráðgeva á skrivstovu síni á fólkatingi.

Nýggi samskiftisráðgevin byrjar í starvinum, tá fólkatingið kemur saman aftur fyrsta týsdag í oktober. Jóhann Lützen er í løtuni í ferð við at leggja síðstu hond á serritgerð sína innan samskifti frá Roskilde Universitetscenter. Umframt nýggja samskiftisráðgevan arbeiðir Sonja Albrink sum skrivari fyri Anfinn Kallsberg á fólkatingi.

**-nud**

### Vælumtóktir harrar í Manhattan

Hóskvøldið fer Finnur Jensen úr Páll Finnur Páll at undirhalda í Manhattan, meðan Eyðun og Neil standa fyri undirhaldinum fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

Finnur Jensen lesur í Århus, men spælir vanliga í Manhattan hvørja ferð hann er heima, og sostatt eisini nú hann er í Føroyum í summarfrí.

Fríggjakvøldið vera tað ein av best umtóktu tvímansbólkunum á føroysku barrunum, suðuroyingarnir Eyðun og Neil, sum aftur fara á pall. Eyðun Ásason hevur verið rættiliga fastur barrsangari í Manhattan seinastu 3-4 árini, og hansara lívliga og festliga framførsla plagar at fáa Manhattan upp á kók, sigur Rúni Djurhuus leiðari av staðnum.

**-nud**

### Barbara formaður í Fjølmiðlanevndini

Nývalda Fjølmiðlanevndin skipaði seg í fyrradagin.

Á sínum fyrsta fundi skipaði Fjølmiðlanevndin seg við Barbaru Vang sum formanni. Hinir limirnir í nevndini eru Ingi Samuelsen, Halgir Winther Poulsen og Ingolf S. Olsen.

Fjølmiðlanevndin er vald sambært lógini um fjølmiðlaábyrgd, sum kom í gildi tann 1. juli. Nevndin fer nú at orða eina reglugerð um góðan fjølmiðlasið og eina leiðbeining fyri, hvussu og nær fólk kunnu senda nevndini kærur um tað, ið kemur fram í fjølmiðlunum.

**-árni**

### Ísraels-ferð í oktober

Svenning av Lofti, ið hevur skipað fyri ferðum til Ísraels í mong ár, skipar fyri eini bólkaferð til Ísraels 1-12 oktober.

Hann hevur verið í Ísrael tvær ferðir í ár, í mai og í juni. Ferðin í oktober verður skipað á sama hátt sum tær, ið áður er gjørdar. Eisini í fjør vóru tvær ferðir gjørdar til Ísraels.

Okober mánaður er ein góður mánaði at ferðast í til Ísraels. Hitin er passaligur og ikki so ógvisligt við ferðafólki. Tá verður eisini væntandi alt komið aftur í rættlag í landinum eftir ófriðin, ið nú er.